## U17 til Finnlands



Í gjárkvøldið fór føroyska U17-landsliðið í mansflogbólti til Finnlands, har teir skulu taka lut í NM-kappingini. Dreingirnir skulu á ferðini leika ímóti Danmark, Íslandi, Noreg, Svøríki og FInnlandi. Fyrstu dystirnir eru fríggjadagin og kappingin endar sunnukvøldið. Mánadagin er hópurin aftur í Føroyum. Teir, sum manna liðið, eru: Gunnar í Dali, TB, Hugin Albinus, TB, Filip Gram, SÍ, Brandur Heinason, SÍ, Emil Mikkelsen, SÍ, Jan Ellingsgaard, ÍF, Fríði Vang, Nøvan, Leo Joensen, Nøvan, Bogi Midjord, Fleyr, Bjarki Enni, Fleyr, Regin Ellingsgaard, Fleyr og Rói Hentze, Fleyr. Venjarar eru Jan Hentze og Rúna Hentze.

## Jón Rói givið avboð

Tveir av verjustuðlunum hjá føroyska landsliðnum verða ikki við í næsta EM-dystinum. Tað hevur leingi verið greitt, at liðformaðurin, Óli Johannesen, er leikbannaður til dystin ímóti Litava, og nú hevur Jón Rói Jacobsen fingið skaða í fótin og kann ikki spæla. Jón Rói bekladi undir venjing við Aab, og tí er tað vónleyst hjá honum at vera tøkur, tá dysturin móti Litava er á skránni um seks dagar.

# Fimm milliardir til spælarar

**Transfer-vindeygað er stongt á hesum sinni eftir summar, har ensku feløgini hava keypt meira, enn tey nakran tíð áður hava gjørt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við eini sjónvarpsavtalu, sum hetta kappingarárið er økt við góðum trimum milliardum brutto, og við útlendskum ríkmonnum sum nýggir eigarar av fleiri feløgum, hava Premier League feløgini í summar keypt spælarar sum ongan tíð áður.

Deloitte's Sports Business Group hevur gjørt upp, at feløgini í Premier Leagu í ár hava keypt spælarar fyri oman fyri £500 mió – ella á leið 5,5 mia kr.

Hóast teir í fjør vunnu meistaraheitið, so eru tað Manchester United, sum við £51 mió eru ovastir á listanum. Liverpool nýtti £50 mió og Tottenham á leið £40 mió. Í alt vóru 12 feløg, sum nýttu oman fyri £20 mió í summarsteðginum. Tey feløgini vóru bert trý í tali í fjør.

Verða innanhýsis handlar roknaðar frá í samlaðu nýtsluni, so var meirnýtsla í summar í mun til summarið 2006 £140 mió ella bara helmingurin av tí, sum øktu sjónvarpsinntøkurnar geva. So alt í alt er talan helst um sunnari fíggjarstýring í enskum fótbólti hetta kappingarárið.

Í Europa var Real Madrid tað felagið, sum nýtti mest pening. Sponsku meistararnir nýttu um £80 mió til spælarakeyp í summar. Barcelona nýtti um £50 mió. Samstundis hava tey bæði sponsku stórfeløgini – eftir eitt stutt boykott mótvegis sjónvarpsstøðum – gjørt sínar egnu sáttmálar um sjónvarpsrættindi. Hesir sáttmálarnir geva væntandi eitt árligt gjald á £100 mió til hvørt av feløgunum frá komandi kappingarári at rokna. Hetta er tvífalt so tað, sum størstu feløgini í Onglandi fáa sambært nýggju sjónvarpsavtaluni.



*Manchester United er tað enska felagið, sum hevur nýtt flest pengar í summar. Millum annað til keypið av Owen Hargreaves úr Bayern München*
*Mynd: Polfoto/AP*

# Svangar heimsstjørnur standa og bíða

**Eftir at tað kiksaði hjá teimum í U-21 endaspælinum í summar vilja italiumenn vísa, at teir í U-21 kappingini framvegis teljast millum teir bestu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki eiti á mótstøða, sum føroyska U-21 landsliðið fer at standa andlit til andlit við í annaðkvøld. Italsku heimsmeistararnir eru á triðja plássi á FIFA styrkislistanum, og helmingurin av teimum 22 spælarunum, sum venjarin, Pierluigi Casiraghi, hevur undir hond, nú hann fyrireikar seg til EM undankappingardystirnar ímóti Føroyum fríggjakvøldið og ímóti Albania í næstu viku, spæla við feløgum í seriu A.

Italiumenn eru svangir. Í U-21 endaspælinum í Hollandi í summar gekk tað ikki, sum teir høvdu roknað við. Italia tapti 1-0 ímóti Serbia, ímóti Onglandi endaði tað 2-2, og so vunnu teir 3-1 á Kekkia. Hetta bar triðja pláss í bólkaspælinum við sær, og so noyddust italiumenn at fara til hús, tá ið hinir fóru at telvast í finaluumførunum.

21. august spældi Italia vinardyst ímóti Fraklandi, og Italia vann 2-1. Millum mest eyðsýndu avrikini vóru tey hjá álopsstjørnunum Giuseppe Rossi og Sebastian Giovinco. Hesin seinni legði upp til fyrra málið ímóti Fraklandi, sum Daniele Dessena skoraði. Hetta var í 37. minutti, og tríggjar minuttir seinni fluktaði Rossi við vinstra beini til 2-0.

- Teir eru als ikki at steðga, tá ið vit eru í álopi, sigur italski U-21 venjarin um álopsspælararnar, sum báðir hava skift felag í summarsteðginum. 21 ára gamli Giovinco er leigaður frá Juventus og til Empoli FC, og 20 ára gamli Rossi flutti í summar til sponsku UEFA Cup vinnararnar Villarreal.

- Eg haldi liðið hjá okkum hevur stórar møguleikar í sær. Her eru nógvir spælarar, sum hava framúr góð evni, og vit fara ikki at undirmeta Føroyar ella Albania, sigur Rossi, sum føddur í USA. Inntil fyri stuttum hevur hann verið sáttmálabundin at Manchester United. Hann var útleigaður til Newcastle, so skifti hann til Parma í heimlandinum, og nú er hann altso fast inventar í La Liga í Spania. Fríggjakvøldið skal hann spæla ímóti føroyska U-21 landsliðnum

Higartil hevur Italia spælt eina ferð í nýggju EM undankappingini. Teir vunnu 4-0 á Albania. Meðan Føroyar eru spildurnýggjar í U-21 landsliðshøpi, so siga tølini, at Italia hevur nógvar royndir. Teir hava spælt 167 dystir, hava vunnið 104 ferðir, spælt javnt 37 ferðir og tapt 26 ferðir.

Av sjey teimum seinastu EM endaspølunum fyri U-21 landslið hevur Italia verið best fimm ferðir. Tað ber næstan ikki til at leita eftir størri mótstøðu enn henni, sum Føroyar ffara at standa andlit til andlit við í norður italska býnum Trento fríggjakvøldið!

## Hópurin

| | |
|---|---|
| Gunnar Nielsen | Blackburn |
| Símun Rógvi Hansen | B71 |
| Jónas Tór Næs | AB |
| Pætur T. Jørgensen | AB |
| Einar Hansen | NSÍ |
| Jóhan Davidsen | NSÍ |
| Bogi A. Løkin | NSÍ |
| Poul Thomas Dam | HB |
| Emil N. Leifsson | HB |
| Ólavur í Ólavsstovu | HB |
| Páll M. Joensen | HB |
| Levi Hanssen | Skála |
| Jóhan V. Gunnarsson | B36 |
| Arnbjørn T. Hansen | EB/Streymur |
| Sam Jacobsen | GÍ |
| Magnus Olsen | B71 |
| Kristoffur Jakobsen | KÍ |
| Christian R. Mouritsen | Man. City |